Jóhan Eli Poulsen
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52 a

Fyrispurningur um eftirmeting av stongdum leiðum og royndarveiðu á Føroyabanka, settur landsstýrismanninum í Fiskivinnumálum, Jacob Vestergaard (at svara skrivliga eftir TS § 52 a)

1. Hvussu gongur við arbeiðinum at eftirmeta stongdu leiðirnar og nær kann væntast, at hetta arbeiðið verður liðugt?
2. Verða allar leiðir eftirmettar/endurskoðaðar ella bert nakrar?
3. Hvørjar partar ætlar mann at taka inn í eftirmetingararbeiðið, so sum Havstovuna, vinnuna og líknandi?
4. Við teimum úrslitum, ið royndarveiðan á Føroyabanka hevur havt, er so hugsandi, at fiskiskapur á bankanum kann takast upp aftur í næstum?

Viðmerkingar:
Samgonguskjalið staðfestir, at skipanin við stongdum leiðum á landgrunninum verður eftirmett og at royndarveiða á Føroyabanka heldur fram við tí endamáli at kanna, um veiða á bankanum kann takast uppaftur.

Ì løtuni er stórur partur av grunninum stongdur fyri bæði trolveiðu og aðrari veiðu. Tá ið øki verða stongd, og soleiðis víddin at veiða á minni, verður eitt størri trýst á tey øki, ið eru opin. Tað kann neyvan vera rætt, at ein so stórur partur av grunninum skal vera stongdur fyri fiskiskapi. Hyggja vit eftir veiðitrýstinum í dag, í mun til hvat tað var fyri bert 15-20 árum síðan, er lítil og ongin ivi um, at veiðitrýstið er nógv lægri í dag. Tað eru í dag 9 pør og 4 djúpvatnstrolarar, ið royna undir Føroyum. Árið runt eru tað bert 6 pør, ið royna eftir trationellum botnfiski undir Føroyum, og okkurt at hesum pørum er fyri tað mest djúpt.

Spyr ein fiskiskiparar, serliga á trolarum, um hvussu sær út á teimum økjum ið verða lítið troytt, er svarið einmælt, at har er armóð komin í. Ein fær bert havmús og skøtu í trolið, og er hetta eitt ringt tekin. Tískil er tað týdningarmikið, at mann sleppur at royna á flestu økjum. Gýtingarøki og koraløki eiga framhaldandi at verða vard.

Tosað verður nógv um, at Føroyar skulu verða “grønari” á orkuøkinum, og er tað serliga fiskivinnan, ið dálkar. Um fleiri øki vórðu opnað aftur, høvdu skipini ofta sloppið undan at siglt tímavís yvir um stongd øki, og soleiðis osað CO_2 út. Skipini brúka meira undir sigling enn undir tóving. Tískil er tað skilagott, at skipini sleppa at tóva seg runt heldur enn at sigla seg runt.

Skiparar á skipum í bólki 2 hava sent fiskimálaráðnum inn uppskot um, hvørji øki kunnu verða opnað í fyrstu syftu, og hvussu hettar kann gerast.

Á Løgtingi, 16. november 2020

Jóhan Eli Poulsen